Hanna D. Andreassen

Fra:	Johan Isak Suni Hansen <JohanH@setur.fo>
Sendt:	hósdagur, 18. desember 2025 13:52
Til:	Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Cc:	Journal
Emne:	FW: Hoyringssvar frá Námsvísindadeildini til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan - Ásetingar um skipan av landsroyndum
Vedhæftede filer:	Hoyringssvar til uppskot at strika N-T landsroynd-4fl-2025.pdf; Uppskot til ll. um broyting í ll. um fólkaskúlan Avtaka landsroynd í N&T í 4. flokki.docx
Prioritet:	Høj

Hoyringssvar frá Námsvísindadeildini í samband við ætlaða broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan um avtøku av landsroynd í náttúru og tøkni í 4. Flokki

Námsvísindadeildin mælir frá at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki, og mælir til at heldur at farið verður undir at tryggja støðið undir lærugreinini, við at næmingarnir fáa náttúru og tøkni heilt frá 1. flokki. Harvið fæst eitt munandi betri grundarlag fyri landsroyndini.

Vit loyva okkum eisini at vísa á hesi viðurskifti í viðmerkingunum til uppskotið:

Samstundis sum landsstýrismaðurin ætlar at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða og nágreina hvussu innihald og nýtsla av úrslitum frá landsroyndunum skal skipast, so ynskir hann at fremja broytingina um avtøku av landsroyndini í náttúru og tøkni í 4. fl. beinanvegin, hetta uttan annað grundarlag enn at "fleiri mæla til".
Í svarinum til undanhoyringina vísti Námsvísindadeildin á, at lærugreinin heimstaðarlæra er í hinum norðurlondunum skift út við náttúru og tøkni. Hetta merkir, at næmingarnir í londum sum vit samanbera okkum við, hava lært um náttúruvísindalig viðurskifti í 3 ár fleiri enn føroyskir næmingar.
Sambært viðmerkingunum er endamálið við uppskotinum, at "næmingarnir varðveita gleðina og forvitnið við at læra um náttúr og tøkni, heldur enn at arbeiða móti einum ávísum úrsliti í eini roynd". Hesum tekur Námsvísindadeildin undir við, og mælir til, at arbeitt verður við at menna reglugerðir og vegleiðingar um, hussu landsroyndin skal fara fram, soleiðis at undirvísingin ikki verður stýrd av landsroyndum. Lærarar venja til landsroynd, tí næmingarnir kenna tað sum at fara til prógtøku. Tað eiga vit at broyta, soleiðis at tað er skúlaskipanin, sum er til prógtøku, ikki næmingarnir. Vit eiga at seta spurningin, um tað er neyðugt at næmingarnir fáa síni egnu úrslit.

Hetta eru alt viðurskifti, sum eru viðkomandi at leggja fyri ein arbeiðsbólk. Tí er tað ein stór andsøgn, at gera eina slíka broyting áðrenn viðurskiftini eru greinað, tí arbeiðsbólkurin kann hava heilt onnur tilmæli enn at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki.

Námsvísindadeildin hevur hesar grundgevingar fyri at varðveita landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki:

- Landsroyndin er myndugleikans amboð at tryggja skúlaskipanina, og at tryggja at næmingarnir fáa javnbjóðis vitan í boði, uttan mun til hvar teir ganga í skúla. Sostatt eru tað ikki næmingarnir sum eru til prógtøku, men skipanin.
- Verður landsroyndin fyrst avtikin í 4. flokki, so kann gerast torført at fáa hana innaftur.
- Landsroyndin er eitt týdningarmikið granskingaramboð.
- Námsvísindadeildin metir landsroyndirnar sum týdningarmikið amboð at fylgja við í, hvat næmingarnir megna.

Námsvísindadeildin staðfestir, at landsroyndin er eitt amboð hjá myndugleikunum at vísa á og leiðbeina lærarum um, hvørjir førleikar eru týdningarmiklir hjá næmingum í 4. flokki at hava.
Tí mæla vit til, at arbeiðið við at menna landsroyndirnar verður styrkt, so landsroyndirnar geva hesa leiðbeining á dygdargóðan hátt.

Viðhefti:
Svar til undanhoyring í samband við møguliga avtøku av landsroynd í náttúru og tøkni í 4. Flokki

---
Bólkurin, sum hevur arbeitt við at orða hoyringssvarið hevur verið mannaður av umboðum fyri STEM-lærugreinarnar.

Hesi eru:

Erla Olsen, lektari í lívfrøði og náttúruvísindaligari lærufrøði
Ingi Højsted, lektari í støddfrøði undirvísing, granskingarleiðari
Søren Antoft, námslektari í støddfrøði og alis- og evnafrøði
Tóri Slættalíð, námslektari í støddfrøði

Vinarliga/Best regards

Elsa Maria H. Hansen, Samskipari/Coordinator
Námsvísindadeildin/Faculty of Education
Tel: + 298 299407
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

Svar til undanhoyring í samband við møguliga avtøku av landsroynd í náttúru og tøkni í 4. flokki

Námsvísindadeildin er biðin um at upplýsa, í hvønn mun vit meta ta vera skynsamt at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki, og at grundgeva fyri hesum, annaðhvørt vit halda landsroyndin skal takast av, ella hon skal varðveitast.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísir á, at skúlafólk bæði óformliga og í formellum tilmæli hava mælt til, at landsroyndin í náttúru og tøkni í 4. flokki verður avtikin.

Til hesa uppgávu hevur Námsvísindadeildin sett ein arbeiðsbólk við 4 limum, sum allir hava tilknýti til náttúruvísindaligu undirvísingarfakini.

Grundgevingar fyri at avtaka landsroyndina í 4. flokki
Ein skilvís grundgeving fyri at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki, eftir okkara hugsan, er tann, at føroyski skúlin, sum tann einasti her á okkara leiðum, ikki byrjar við náttúrufakum fyrr enn í 4. flokki. Hetta ger, at næmingarnir hava bert havt náttúruvísindalig fak í nakrar mánaðir, tá teir skulu til landsroynd, og tí er avmarkað, hvussu nógv landsroyndin kann kanna innan lærugreinina náttúra og tøkni í 4. flokki.

Frá summum skúlum frættist, at teir brúka nógva orku uppá at "venja" til landsroyndir, samstundis sum næmingarnir halda, at tað eru teir sum eru til prógvtøku. Hetta er sjálvandi óheppið og eigur at vera fyribyrgt. Samstundis er hetta tó ikki ein grundgeving fyri bert at avtaka landsroyndina í 4. flokki, og bert í náttúru og tøkni.

Ein orsøk, at fleiri vilja avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki, er, at tað í ov lítlan mun er møguligt at brúka hana til at meta um fakligu førleikamálini, sum eru lýst í námsætlanini, sum í stóran mun leggur upp til kannandi virksemi. Til hetta er at siga, at námsætlanin, í flestu førum sigur, at tey skulu kanna og lýsa. Sostatt kunnu tey í landsroyndini fáa kanningarúrslit, sum tey skulu lýsa, og greiða frá. Endamálið við kanningunum er, at tey fáa nøkur úrslit at grunda yvir.

Gomul avbjóðing
Náttúruvísindaligu lærugreinarnar hava ikki fylgt við broytingunum sum annars hava verið framdar í skúlaverkinum, ofta eftir donskum leisti. Til dømis hava vit valt at varðveita lærugreinina heimstaðarlæru. Í Noreg høvdu tey hesa lærugrein frá 1922-1974, og í Danmark er hon eisini langt síðan avtikin. Sostatt hava føroyskir næmingar 3 ár færri við náttúruvísindaligari undirvísing enn næmingar í teimum londum, sum vit samanbera okkum við. Hetta sæst eisini aftur í m.a. PISA úrslitunum, har vit øll árini hava verið eftirbátur, serliga í náttúruvísindum.
Longu í 2006 mælti ein arbeiðsbólkur, sum varð settur at viðgera úrslitið frá fyrstu PISA-kanningini, sum Føroyar luttóku í, til, at náttúra og tøkni skuldi vera lærugrein við tveimum tímum um vikuna heilt frá 1. flokki. Hetta er eitt tilmæli, sum vit á Námsvísindadeildini taka undir við. Sí eisini eitt hoyringsskriv (niðanfyri) viðvíkjandi

broyttari námsætlan í heimstaðarlæru, har vit hava lýst søguligu gongdina innan náttúruvísindaligu lærugreinarnar og roynt at grundgeva fyri, at byrjast skal við náttúru og tøkni í 1. flokki.

Grundgevingar fyri at varðveita landsroyndina í 4. flokki
Landsroyndin er myndugleikans amboð at tryggja skúlaskipanina, og at tryggja at næmingarnir fáa javnbjóðis vitan í boði, uttan mun til hvar teir ganga í skúla. Sostatt eru tað ikki næmingarnir sum eru til prótvøku, men skipanin.
Verður landsroyndin fyrst avtikin í 4. flokki, so kann gerast torført at fáa hana innaftur.
Landsroyndin er eitt týdningarmikið granskingaramboð.
Vit á Námsvísindadeildini meta landsroyndirnar sum týdningarmikið amboð at fylgja við í hvat næmingarnir megna. Sum dømi kann nevnast, at vit nú í summar hava fingið atgongd til týdningarmiklar dátur, har vit kunnu síggja, hvussu førleikabýting roynist. Hesar dáturnar verða greinaðar komandi mánaðin.

Tilmæli
Heldur enn at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki, eigur at verða farið undir at tryggja støðið undir lærugreinini, við at næmingarnir fáa náttúru og tøkni heilt frá 1. flokki. Harvið fæst eitt munandi betri grundarlag fyri landsroyndini.

Tórshavn, 19. august 2025

Erla Olsen, lektari í lívfrøði og náttúruvísindaligari lærufrøði

Ingi Højsted, lektari í støddfrøði undirvísing, granskingarleiðari

Søren Antoft, námslektari í støddfrøði og alis- og evnafrøði

Tóri Slættalíð, námslektari í støddfrøði

Viðhefti: Hoyringssvar frá Námsvísindadeildini til uppskot til nýggja námsætlan í heimstaðarlæru. Sent til Nám í januar 2025.

Hoyringssvar til uppskot til nýggja námsætlan í heimstaðarlæru 2025

Søguligt baksýni

Heimstaðarlæra er framvegis ein lærugrein í føroyska fólkaskúlanum. Hetta er ein leivd frá áðrenn skúlin varð yvirtikin. Í áliti viðvíkjandi lóg um føroyska fólkaskúlan frá 1978 sæst, at heimstaðarlæra/hjemstavnslære er lærugrein í føroyska fólkaskúlanum Í Danmark varð hjemstavnslære tikin av í 1958. Endamálið við heimstaðarlæru var eisini at hava viðkomandi undirvísingartilfar, t.v.s. at fokus var á býlingin hjá einstaka næminginum, bæði søguliga, handverksliga, vinnuliga, amboðsliga o.a. Danski skúlin hevur síðan broytt kós, í strembani eftir at skipa eindarskúlan, og lærugreinin heimstaðarlæra varð býtt sundur í søgu, samfelag, tøkni, lívfrøði, landafrøði. Í Danmark vórðu tøkni & alis/evnafrøði, lívfrøði og landafrøði løgd saman til Náttúra og tøkni.

Í áliti frá 1996 um nýggja fólkaskúlalóg[1] - har lærugreinirnar vórðu skipaðar í tríggjar bólkar, við heimstaðarlæru innan náttúruvísindi, stendur soleiðis at lesa um lærugreinina heimkunnleika:

> **Heimstaðarlæra**
>
> Lærugreinin heimstaðarlæra, sum í sínum innihaldi fevnir um tær tríggjar kunningargreinirnar [?somu sum í N&T - ella er talan um søgu, landalæru og lívfrøði, soleiðis sum stendur í leiðbeinandi lesiætlanini?], er óbroytt í uppskotinum. Í tí nýggju endamálsorðingini verður sagt, at skúlin skal hjálpa næmingunum at fata "samspæl manna við náttúruna". Sum aðrastaðni er nomið við, so hóttir menniskjan alla náttúruna við eirindaleysu framferð síni, og tí verður hildið neyðugt, at eisini tann føroyski skúlin við kenslu og upplýsing síni kann ávirka hugburð hins unga rætta vegin, áðrenn ov seint er. Ætlan nevndarinnar er, at undirvísingin í heimstaðarlæru skal fara fram við serligum atliti at hesum viðurskiftum í heimliga umhvørvi næminganna, og at lesiætlanin í heimstaðarlæru verður broytt samsvarandi.
>
> **Náttúra/tøkni**
>
> Samsvarandi hesum er tí skotið upp, at henda undirvísing síðan heldur fram serstakliga í lærugreinini náttúra/tøkni, ið sostatt er vorðin nýggj og kravd lærugrein í 4.-6. skúlaári. Høvuðspartarnir í náttúra/tøkni fara framhaldandi at fevna um lærugreinirnar landalæru, lívfrøði og nú eisini alis-/evnafrøði. Av hesum eru landalæra, lívfrøði og alis-/evnafrøði ikki sjálvstøðugar lærugreinir fyrr enn í 7.-9. skúlaári. Av nevndu viðurskiftum er tann alis-/evnafrøðiligi parturin styrktur munandi í hesi nýggju lærugreinini.
>
> Undirvísingin í náttúra/tøkni eigur at verða ráðløgd soleiðis, at næmingarnir eisini fáa høvi at gera royndir og at arbeiða við ítøkiligum uppgávum, so at teir á henda hátt læra betur at kenna og geva sær far um bæði umhvørvi og umheim. Hildið verður, at tað innlit og teir arbeiðshættir, sum næmingarnir ogna sær í lærugreinini náttúra/tøkni, kann koma teimum seinni til góðar, so at teir

[1] http://tilfar.lms.fo/logir/alit/1996.12%20Álit%20um%20nýggja%20fólkaskúlalóg.pdf

> verða enn betur førir fyri at fata tær fakligu luteindirnar í umrøddu lærugreinum, sum tá byrja í 7.-9. skúlaári.
>
> Ráðleggingarnevndin leggur dent á, at neyðugt verður at gera leiðbeinandi lesiætlan í lærugreinini náttúru/tøkni (og dagføringar í lesiætlanini heimstaðarlæru), áðrenn farið verður undir undirvísing í hesi nýggju lærugreinini, sí §71, 3. stk. og greinina *Náttúra/tøkni*.

Í álitinum frá 1996 verður síðan gjørt eitt yvirlit yvir lærugreinarnar, og har stendur at lesa, at

> Heimstaðarlæra: eingin broyting
> Náttúra/tøkni: nýggj, kravd lærugrein í 4.-6. skúlaári
> Alis-/evnafrøði: eingin broyting
> Landalæra: kravd lærugrein í 7.-9. skúlaári; er kravd frá 4.-9. skúlaár í verandi lóg

Leiðbeinandi lesiætlanirnar eru frá 1991[2]. Tá hugt verður eftir hesum sæst, at galdandi námsætlan í heimstaðarlæru frá 2011 er grundað á leiðbeinandi lesiætlanina fyri heimstaðarlæru frá 1991, og at atlit til staðfestingina um at dagføringar vóru neyðugar (frá 1996) ikki eru framd. Hetta møguliga tí listin yvir lærugreinirnar segði, at eingin broyting var neyðug, hóast tað stóð í tekstinum.

Tá Føroyar fyrstu ferð luttóku í PISA, vóru náttúruvísindi høvuðsøki. Sum kunnugt var úrslitið ikki gott, og til at viðgera úrslitið og koma við tilmælum varð settur ein arbeiðsbólkur, sum í 2006 mælti til, at Náttúra og tøkni skuldi vera lærugrein við 2 tímum um vikuna heilt frá 1. flokki. Hetta hendi tó ikki.

Í 2015, tá náttúruvísindi aftur vóru høvuðsøki í PISA, varð mint á tilmælið frá 2006, og samstundis sum mælt varð til at endurskoða námsætlanirnar:

> Nøkur av tilmæltu tiltøkunum frá 2006 eru sett í verk, men í mun til náttúruvísindi hava tey ikki altíð hepnast væl. Millum annað var ætlanin, at lærugreinin heimstaðarlæra skuldi vera partur av náttúru- og tøkni, men sambært námsætlanunum er als eingin alis- og evnafrøði í heimstaðarlæru.
>
> Námsætlanirnar í náttúruvísindaligu lærugreinunum eru ov grunnar og óneyvar í mun til førleikakrøvini í PISA, og tær seta ikki ikki nóg neyv krøv til, hvussu væl næmingarnir skulu kenna evni, háttaløg og ástøði. Tí verður mælt til at endurskoða námsætlanirnar.

Í frágreiðingini frá PISA kanningini í 2015 varð eisini víst á, at føroyskir næmingar væntandi hava færri tímar í náttúruvísindum enn aðrir norðurlendskir næmingar júst tí so lítið av náttúruvísindum er í lærugreinini heimstaðarlæru.

Hetta, heldur drúgva, søguliga baksýni er grundarlagið undir teimum viðmerkingum, sum her verða frambornar. Nýggja uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan, sum eisini er til hoyringar í hesum døgum, bólkar eisini heimstaðarlæru undir náttúruvísindi, saman við støddfrøði. Uppskotið til nýggja fólkaskúlalóg hevur sett

[2] http://tilfar.lms.fo/logir/alit/1991.19%20Fólkaskúlin%20-%20Leiðbeinandi%20lesiætlan%20-%20Yrkisligur%20partur.pdf

2 tímar av til mentanarfak longu frá 1. flokki, ella líka nógv sum lærugreinin heimstaðarlæra hevur í verandi líki.

Samanbering við verandi námsætlanina

Lærugreinin heimstaðarlæra fevnir um 60 klokkutímar hvørt árið, ella 2 undirvísingartímar um vikuna. Kjarnuøkini eru 5 í tali: Árið, Næmingurin og nærumhvørvið, Náttúra og umhvørvi, Mentan og siðir, Føroyar og heimurin uttan um okkum.

Ávegismálini í verandi námsætlan eru nógv, hvørt knýtt at ávísu kjarnuøkjunum. Tá samanborið verður verið nýggja uppskotið, so sæst, at innihaldið í ávegismálunum er ikki eins útgreinað, men innihaldið rættiliga líkt. Tó so, at økið "heimurin uttan um okkum" tykist verða tikið burturúr.

Roknast kann við, at ætlanin er, at dentur skal leggjast á øll kjarnuøkini, og harvið er mentan og siður framvegis partur av hesi lærugrein, samstundis sum eingi beinleiðis evni innan tøkni og alis- og evnafrøði eru sloppin við.

Gomlu ávegismálini eru hesi	Nýggju ávegismálini eru hesi
Árið • at skyna á klokku • at greiða frá vikudøgum, mánaðum og árstíðum • at greiða frá høgtíðum og ymiskum halgi- og merkisdøgum • at greiða frá flytifuglum, nær teir koma og fara.	Heitið strikað • at skyna á tíð og seta orð á, hvussu árið er býtt upp í tímar, dagar, vikur, mánaðir og árstíðir
Næmingurin og nærumhvørvið • at greiða frá grundleggjandi kropsrøkt • at greiða frá ættarbondum • ferðslureglur, sum hann hevur brúk fyri, t.d at vera ansin í ferðsluni, at nýta hjálm, tá ið hann súkklar ella rulluskoytar, at nýta endurskin, at kenna ljóskurvarnar og gongufeltini og at nýta bilbelti • at greiða frá tí, sum er í nærumhvørvinum, t.d. krambúðum, skúla, dagstovnum og arbeiðsplássum • at greiða frá muni millum bygd og býr.	Næmingurin og nærumhvørvið • at skilja týdningin av grundleggjandi kropsrøkt. • at greiða frá tí, sum er í nærumhvørvinum viðkomandi ferðslureglur • grundleggjandi føroyska landalæru (lutvíst)
Náttúra og umhvørvi • at greiða frá vanligastu keli- og húsdýrunum • at greiða frá, hvaðani mjólkin kemur og at greiða frá vanligastu mjólkaúrdráttunum • at greiða frá fjallgongu, og hvat ið fæst burtur úr slaktinum • at greiða frá vanligu fuglunum, t.d. tjaldri, ternu, likku, stara, kráku, kvørkveggju, spurvi og dúgvu • at greiða frá vanligastu bjargafuglunum, t.d. súlu, lunda og lomvigu • at greiða frá vanligum blómum í nærumhvørvinum, t.d. sólju, summardáa, smæru, blákollu og børkubónda • at greiða frá vanligum smákyktum, t.d. flugu, skinnflugu, grindalokki, torvatrølli, tvístertu, vespu og summarfuglum • at greiða frá nøkrum dýrum í fjøruni, t.d. krabba, kræklingi og gággu • at greiða frá nøkrum dýrum, ið liva í Føroyum og við Føroyar, t.d grindahvali, kópi og haru	Náttúra og umhvørvi • at hugleiða um, hvussu vit kunnu taka umhvørvisliga tilvitað val og seta umhvørvistiltøk í verk • at arbeiða við og greiða frá blómum og smákykta-, fugla- og djóralívi í Føroyum • at seta orð á, hvørjir sansir eru, og hvussu teir verða nýttir í gerandisdegnum • at síggja náttúruna í ymiskum árstíðum, og hvussu hon broytist

• at greiða frá teimum orkukeldum, ið eru vanligar í Føroyum, t.d. vatni, olju og vindorku • at greiða frá okkara vatnnýtslu • at skilja burturkast og at hugsa náttúruvinarligt, t.d. endurnýtsla áðrenn burturkast • at vísa á ymisk náttúrufyribrigdi, t.d. oyggjar, bygdir, fjøll, vøtn, áir, hólmar, firðir og sund • at greiða frá høvuðsættunum	
Mentan og siðir • at greiða frá jóla-, páska- og føstulávintshaldi • at greiða frá ólavsøku og ólavsøkuhaldi • at greiða frá stevnum, kappróðri og bátastøddum • at greiða frá føroyska búnanum • at greiða frá klædnabúna fyrr og nú • at greiða frá nøkrum listagreinum, t.d. málninga, keramikk og træskurðalist. Her kann serligur dentur verða lagdur á list, sum er í nærumhvørvinum • at greiða frá nøkrum ítróttargreinum. Her kann serligur dentur verða lagdur á ítrótt, sum er í nærumhvørvinum • at greiða frá gomlum føroyskum spølum umframt nøkrum nýggjum spølum • at greiða frá grindadrápi og føstum mannagongdum í sambandi við grindadráp.	Mentan og siðir • at hugleiða um og greiða frá føroyskum siðum, høgtíðum og merkisdøgum
Føroyar og heimurin uttan um okkum • at greiða frá oyggjunum í Føroyum • at greiða frá grannabygdunum • at greiða frá norðurlondunum • at greiða frá norðurlendsku fløggunum • at greiða frá høvuðsstaðunum í Norðurlondum • at greiða frá heimspørtunum og heimshøvunum • at lesa landakort • at greiða frá, at jørðin er ein partur av einari sólskipan saman við øðrum gongustjørnum.	Einki heiti, innihaldið lutvíst varðveitt í orðingini "grundleggjandi føroyska landalæru"
	Náttúrufrøðilig vísindaástøði • at undrast, kanna og skapa spurningar og knýta hetta at egnum ella annara upplivingum

Samanberingar við norsku námsætlanirnar

Í talvuni niðanfyri er atlit tikið fyri, at Nám hevur sagt, at tey stuðla seg serliga at norsku "Læreplaner". Norsku og føroysku førleikamálini eru bólkað eftir teimum donsku førleikamálunum, sum eru býtt sundur í fýra flokkar. Norsku og føroysku námsætlanirnar hava eisini fyribrigdið "Nature of Science", sum her er umsett til Náttúrufrøðilig vísindaástøði. Hetta er sera gott, men sæst ikki nóg væl aftur innan kjarnuøkini í føroysku námsætlanini, sum er til hoyringar.

Meðan donsku og norsku ætlanirnar hava ávegis mál í 2. og 4. flokki, hava føroysku námsætlanirnar ávegismál í 3. flokki. Nøkur av norsku málunum koma fyri í førleikamálunum fyri Náttúru & Tøkni í 4. flokki. Tað er tó einki sum bendir á, at føroyska námsætlanin miðar eftir at røkka sama støði sum tann norska, um teigarnir í talvuni niðanfyri verða samanbornir.

Floksstig	Donsku Fælles mál	Norsku Læreplaner	Føroysk NÆ í hoyring
Náttúrufrøðilig vísindaástøði 2. flokkur		• undre seg, utforske og lage spørsmål, og knytte dette til egne eller andres erfaringer	• at undrast, kanna og skapa spurningar og knýta hetta at egnum ella annara upplivingum

Náttúrufrøðilig vísindaástøði 4. flokkur		• undre seg, stille spørsmål og lage hypoteser og utforske disse for å finne svar	
Undersøgelse 2. flokkur	• Eleven kan udføre enkle undersøgelser på baggrund af egne og andres spørgsmål	• utforske og beskrive observerbare egenskaper til ulike objekter, materialer og stoffer og sortere etter egenskaper • utforske et naturområde i nærmiljøet og beskrive hvordan noen organismer er tilpasset området og hverandre • planlegge og gjennomføre undersøkelser av vær og himmelfenomener og sammenligne målinger, observasjoner og værtegn gjennom året • utforske sansene gjennom lek ute og inne og samtale om hvordan sansene brukes til å samle informasjon	• at arbeiða við og greiða frá blómum og smákykta-, fugla- og djóralívi í Føroyum • at seta orð á, hvørjir sansir eru, og hvussu teir verða nýttir í gerandisdegnum
Undersøgelse 4. flokkur	• Eleven kan gennemføre enkle underspøgelser på baggrund af egne forventninger	• utforske teknologiske systemer som er satt sammen av ulike deler, og beskrive hvordan delene fungerer og virker sammen • designe og lage et produkt basert på en kravspesifikasjon • utforske og beskrive hvordan noen stoffer kan endre seg når de blandes med andre stoffer • utforske observerbare størrelser som fart og temperatur og knytte dem til energi • utforske et naturområde og drøfte bærekraftig bruk av området • utforske og sammenligne ulike dyre- og plantearters tilpasninger til miljø og levesteder og drøfte hvorfor noen arter dør ut • delta i høsting og bruk av naturressurser og drøfte hvordan naturressurser kan brukes på en bærekraftig måte	
Modellering 2. flokkur	• Eleven kan anvende naturtro modeller	• oppleve naturen til ulike årstider, reflektere over hvordan naturen er i endring, og hvorfor året deles inn på ulike måter i norsk og samisk tradisjon	• at skyna á tíð og seta orð á, hvussu árið er býtt upp í tímar, dagar, vikur, mánaðir og árstíðir • at síggja náttúruna í ymiskum árstíðum, og hvussu hon broytist
Modellering 4. flokkur	•	• sammenligne modeller med observasjoner og samtale om hvorfor vi bruker modeller i naturfag • utforske og beskrive vannets kretsløp og gjøre rede for hvorfor vann er viktig for livet på jorda • bruke tabeller og figurer til å organisere data, lage forklaringer basert på data og presentere funn	
Kommunikation 2. flokkur	• Eleven kan beskrive egne undersøgelser og modeller	• presentere funnene sine og beskrive hvordan eleven har kommet fram til dem • presentere egne ideer til teknologiske oppfinnelser	• at greiða frá tí, sum er í nærumhvørvinum •

		• samtale om hvordan vi kan ta miljøbevisste valg og gjennomføre lokale miljøtiltak	
Kommunikation 4. flokkur		• samtale om hva energi er, og utforske ulike energikjeder • samtale om hva fysisk og psykisk helse er, og drøfte hvordan livsstil og trivsel påvirker helse • samtale om likheter og ulikheter mellom kjønnene, om kjønnsidentitet og om menneskets reproduksjon • beskrive hvordan muskler og skjelett fungerer, og knytte dette til bevegelse • beskrive funksjoner i kroppens ytre forsvar og samtale om hvordan dette verner mot sykdom	
Perspektivering 2. flokkur	• Eleven kan genkende natur og teknologi i sin hverdag	• gi eksempler på noen vanlige sykdommer og samtale om hva man kan gjøre for å verne kroppen mot smittsomme sykdommer	• at hugleiða um, hvussu vit kunnu taka umhvørvisliga tilvitað val og seta umhvørvistiltøk í verk • at hugleiða um og greiða frá føroyskum siðum, høgtíðum og merkisdøgum • at skilja týdningin av grundleggjandi kropsrøkt.
Perspektivering 4. flokkur		• gi eksempler på god dyrevelferd og reflektere over hvordan dyrs behov kan ivaretas	•
Innihaldsvitan			• grundleggjandi føroyska landalæru • viðkomandi ferðslureglur

Nøkur førleikamál úr føroysku námsætlanini eru sett við reyðum í talvuni omanfyri. Hetta eru slík, sum mælt verður til at flyta til aðrar meira viðkomandi lærugreinar. Og um tað ikki ber til at fáa tað inn í aðrar, so at tað heldur seg uttan fyri kjarnuøkið, men fer av teimum 20% sum eru annað tilfar.

Uppskot:

- "At skyna á tíð v.m." verður flutt til støddfrøði
- "Viðkomandi ferðslureglur" verður flutt til nýggja undirvísingarevnið ferðslulæru
- "At hugleiða um og greiða frá føroyskum siðum, høgtíðum og merkisdøgum" verður flutt til antin til føroyskt ella til nýggja bólkin mentanarfak.

Harumframt at eisini evni innan tøkni og alis-/evnafrøði verða tikin við frá byrjan av, soleiðis at føroysk børn verða javnsett við børn í grannalondunum hesum viðvíkjandi. Um hugt verður eftir norsku námsætlanini, so sæst, at longu í 1.&2. flokki hava tey málið "utforske og beskrive observerbare egenskaper til ulike objekter, materialer og stoffer og sortere etter egenskaper".

Samanumtøka:

Mælt verður til hesar meginbroytingarnar í námsætlanini í heimstaðarlæru, sum er til hoyringar:

At lærugreinin heimstaðarlæra verður gjørd til eina náttúruvísindaliga lærugrein, soleiðis at hon kann vera grundarlag undir lærugreinini Náttúra & tøkni.

Besta loysnin hevði verið at gjørt eins og gjørt verður í grannalondunum, at Náttúra & tøkni byrjar í 1. flokki. Tá kann umhugsast um vit eisini skulu hava ávegis førleikamál í 2. og 4. flokki, heldur enn í 3. og 4. flokki.

Hetta hevur verið tilmælið síðan 1996!

At orðingarnar í námsætlanini í verki tryggja, at lærugreinin heimstaðarlæra (ella Náttúra & tøkni frá fyrsta flokki) verður ein virkin lærugrein, har næmingarnir undrast, kanna, uppliva bæði náttúru og tøkni.

Sum er halda vit ikki at námsætlanin í nóg stóran mun leggur upp til hetta. Tað sæst í samleikanum og í endamálinum, men minkar síðan, og er heilt fráverandi tá komið verður til fakligu førleikamálini. Tað er týdningarmikið at halda næmingarnir til, longu frá byrjan av.

Viðmerkingar til einstøku brotini í námsætlanini heimstaðarlæra (uppskot til hoyringar). Tekstur við reyðum er okkara uppskot til broytingar. Í fakligu førleikamálunum hava vit skrivað viðmerkingar við bláum undir einstøku málunum.

Samleiki: Heimstaðarlæra er lærugrein, sum viðger tey náttúruvísindaligu viðurskifti, sum næmingarnir antin sjálvir uppliva í nærumhvørvinum, ella síggja og/ella hoyra um.

Heimstaðarlæra skal geva næmingunum ans fyri tí, ið finst rundan um tey og ger tey betur før fyri at taka støðu til ymist, sum fer fram í heimi og huga teirra. Undirvísingin skal tryggja, at næmingarnir gjøgnum upplivingar kunnu nýta sítt forvitni og áhaldandi menna síni evni og áhuga at granska og skapa, eins og teir skulu læra kanningarhættir út frá einum náttúruvísindaligum sjónarhorni. Námsfrøðiliga verður lagt soleiðis til rættis, at næmingarnir eisini fara útum skúlastovuna at gera kanningar og at vitja virkir og stovnar.

Heimstaðarlæra leggur lunnar undir lærugreinini náttúra og tøkni.

Endamál: Undirvísingin í heimstaðarlæru hevur til endamáls, at næmingarnir:

- verða eggjaðir til so teir fáa áhuga fyri náttúruvísindum

- læra at seta spurningar og gera kanningar
- geva tí ans, ið fer fram í nærumhvørvinum, og við práti, samrøðum, framløgum og kjaki menna ta vitan, ið tey longu hava um sítt nærumhvørvi og samfelag
- gjøgnum egnar upplivingar og eygleiðingar fáa kunnleika um náttúru, *plantu-* og djóralív í nærumhvørvinum
- ~~læra um føroyska mentan og fólksligar siðvenjur, sum leggja støði undir samanhald og tilknýti til samfelagið.~~ (strikast!!)
-

Kjarnaøki: Lærugreinin heimstaðarlæra hevur trý *samantvinnað* kjarnaøki, *sum* umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.

- Næmingurin og nærumhvørvið
- Náttúra og umhvørvi
- *Tøkni, tilfeingi og evnafrøði*

~~*Mentan og siðir*~~ (strikast)

Næmingurin og nærumhvørvið

Kjarnaøkið *næmingurin og nærumhvørvið* snýr seg um umhvørvið, ið næmingurin dagliga ferðast í og hoyrir um. Talan er um alt, sum fer fram úr fjøru til fjals: við hús, í skúla, í grannalagnum, í bygdini, í býnum, í *framleiðsluvinnuni* o.s.fr. Økið fevnir eisini um kroppin, heilsu, røkt, reinføri og kost.

Náttúra og umhvørvi

Kjarnaøkið *Náttúra og umhvørvi* fevnir um føroysku náttúruna og djóralívið í henni og um veður og vind, orku, endurnýtslu og burturkast. Økið fevnir eisini um landalæru, kortlesing og grannalond – NB - grannalond eru ikki nevnd í førleikamálunum..

Tøkni, tilfeingi og evnafrøði

Kjarnaøkið *tøkni, tilfeingi og evnafrøði* er eitt savnandi kjarnaøki, sum leiðir næmingarnir inn í samansettu viðurskiftini í umhvørvinum, sum næmingarnir eru í. Her verður eisini nomið við matarframleiðslu, og lagt verður upp til, at næmingarnir vitja framleiðsluvirkir, umframt at teir sjálvir at dyrka grønmeti.

Faklig førleikamál

Lærugreinin heimstaðarlæra hevur ávegismál fyri 3. flokksstig. Ávegismálini eru leiðbeinandi, tó soleiðis at skilja, at um munandi frávik koma fyri, skal hetta fráboðast leiðslu skúlans, sum við støði í lýsta tørvinum hevur skyldu til at seta neyðug tiltøk í verk.

Málið við undirvísingini er, at næmingurin dugir:

- at undrast, kanna og skapa spurningar og knýta hetta at egnum ella annara upplivingum – sera gott at hetta er komið við
- at kanna og lýsa sjónligar eginleikar hjá ymsum lutum, tilfari og evnum og bólka eftir eginleikum (utforske og beskrive observerbare egenskaper til ulike objekter, materialer og stoffer og sortere etter egenskaper)
- at greiða frá tí, sum er í nærumhvørvinum – hetta er eitt rættiliga einkisigandi førleikamál. Hvat er tað tey skulu duga - sí t.d. norsku námsætlanina.
- ~~viðkomandi ferðslureglur~~ – hetta halda vit eigur at verða flutt til serstaka undirvísingarevni ferðslulæra. Harumframt lýkur orðingin ikki treytirnar fyri einum førleikamáli.
- ~~at skyna á tíð og seta orð á, hvussu árið er býtt upp í tímar, dagar, vikur, mánaðir og árstíðir~~ – hetta halda vit eigur at verða flutt til aðra lærugrein, t.d. støddfrøði
- at uppliva náttúruna í ymiskum árstíðum, og skráseta hvussu hon broytist
- at gera kanningar úti í náttúruni, greiða frá hvussu tey hava gjørt, og hvat kom burturúr
- at hugleiða um, hvussu vit kunnu taka umhvørvisliga tilvitað val og seta umhvørvistiltøk í verk
- at arbeiða og greiða frá blómum og smákykta-, fugla- og djóralívi í Føroyum, og greiða frá hvussu tey eru tengd hvør at øðrum og at teirra umhvørvi
- ~~at hugleiða um og greiða frá føroyskum siðum, høgtíðum og merkisdøgum~~ hetta halda vit eigur at verða flutt til aðra lærugrein, t.d. føroyskt ella nýggja mentanarfakið sum væntandi kemur
- grundleggjandi føroyska landalæru – Orðingin lýkur ikki treytirnar til eitt førleikamál. Hvat skulu tey læra, hvat er grundleggjandi føroysk landalæra?
- at seta orð á, hvørjir sansir eru, og hvussu teir verða nýttir í gerandisdegnum
- at skilja týdningin av grundleggjandi kropsrøkt og sunnum matarvanum

Nú bleiv hetta hoyringsskrivið rættiliga drúgt. Hetta skal ikki takast sum ein kritikkur av fyriliggjandi uppskoti til hoyring, men heldur vísir tað hvussu umráðandi vit halda tað vera at fáa hetta upp á beint, nú høvi býðst.

Vit vilja fegin koma á fund at greiða nærri frá okkara sjónarmiðum.

Vinarliga

Erla Olsen, lektari í lívfrøði og náttúrulærufrøði

Petur Lamhauge, námslektari í sernámsfrøði

Søren Antoft, námslektari í støddfrøði og alis-/evnafrøði